# 300 barnapornoleitingar um dagin

**Stutt fyri jól setti Føroya Tele eitt filtur upp, sum skal forða fyri, at fólk sleppa á heimasíður við barnaporno. Síðani filtrið bleiv sett upp, eru eini 300 leitingar eftir barnaporno steðgaðar dagliga**

BARNAPORNO
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Barnaporno er ein stórur trupulleiki kring allan knøttin, og eisini her á landi er tað so, at nógv fólk hava áhuga í barnaporno. Føroya Tele hevur í samstarvi við donsku ríkisløgregluna og Red Barnet ment eitt filtur, sum skal forða fyri, at kundar hjá Føroya Tele koma á ólógligar heimasíður við barnaporno.

### Dagførdur listi

Nýggja filtrið hjá Føroya Tele virkar á tann hátt, at danska ríkisløgreglan hevur útvegað Føroya Tele ein lista yvir heimasíður, ið eru ólógligar. Hesin listi hevur ríkisløgreglan gjørt í samstarvi við Red Barnet, sum á altjóða stigi eyðmerkir og samlar inn upplýsingar um, hvar barnaporno er á netinum.



*Eitt filtur, sum Føroya Tele setti upp stutt fyri jól, vísir, at umleið 300 ferðir um dagin leita føroyingar eftir barnaporno á internetinum.*

*Modellmynd: Jens Kr. Vang*

Listin verður regluliga dagførdur, tí nøgdin av barnapornografiskum tilfari á internetinum er støðugt vaksandi, og tað sama er ferðslan til síður við slíkum tilfari.

Síðani filtrið hjá Føroya Tele bleiv sett upp stutt fyri jól, eru umleið 300 leitingar eftir barnaporno steðgaðar dagliga. Hetta er eitt rættuliga høgt tal, og samanborið við onnur norðurlond liggja føroyingar rættuliga ovarlaga á listanum.

# Vit hava ein trupulleika

**Leiðarin á Barnaverndarstovu Føroya, Anna Dam, heldur, at tá ið nýggja filtrið hjá Føroya Tele fangar 300 leitingum eftir barnaporno dagliga, hava vit ein trupulleika, sum vit ikki eru nóg góð at síggja**

BARNAPORNO
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tað kemur ikki óvart á Onnu Dam, at talið av barnapornoleitingum er so høgt, og hon vónar, at fólk, sum hava illgruna um slíkt virksemi, boða frá, tí tað hava tey skyldu til.

### Ikki betur enn onnur

– Høga talið sigur mær, at vit hava ein trupulleika við kynsligum ágangi móti børnum, sum vit eru nóg dugnalig at síggja. Í Íslandi vóru í fjør 270 fráboðanir um kynsligan yvirgang móti børnum, og eg trúgvi ikki, at vit í Føroyum lutfalsliga eru hampuligari enn íslendingar, sigur Anna Dam, sum heldur ein trupulleika verða, at vit føroyingar ikki eru nóg góð at fanga slíkan ágang.

Leiðarin á Barnaverndarstovu Føroya heldur, at tiltakið hjá Føroya Tele er positivt, og hon sigur seg vóna, at tað kann virka fyribyrgjandi á økinum.

### Umráðandi at halda eyga við børnunum

Anna Dam sigur, at tað er av stórum týdningi, at foreldur halda eyga við børnini hjá sær, og hvat tey gera á internetinun, tí tað er ógvuliga lætt hjá teimum at koma á heimasíður við ólógligum tilfari.

– Eg vóni, at fólk gera vart við seg, um tey blíva varhug við slík álvarsmál sum leiting eftir barnaporno. Tú hevur fráboðanarskyldu, um tú hevur illgruna um, at onkur leitar eftir ólógligum tilfari á internetinum. Við nýggju lógini, sum kom í gildi á nýggjárinum, er tað eisini møguligt hjá fólki at venda sær til barnaverndina kring landið og verða dulnevndur, greiðir Anna Dam frá.

# Løgreglan kann finna pedofilarnar

**Richard Mortensen, stjóri á FT Samskifti, sigur, at um løgreglan vil kanna, hvør tað er, sum leitar eftir barnaporno á internetinum, ber tað til**

BARRNAPORNO
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Stjórin á FT Samskifti sigur, at Føroya Tele sjálvt tók stig til at koma við í eitt norðurlendskt samstarv um eitt slíkt barnapornofiltur, og endamálið við hesum er at verja kundarnar og børnini.

### Liggja ovarlaga

– Vit gera hagtøl yvir hesar leitingar, sum vit senda donsku ríkisløgregluni, ið vit jú samstarva við á økinum. Um løgreglan ynskir at gera eitt serligt arbeiði og kanna, hvør tað er, sum leitar eftir barnaporno, ber tað til. Hetta



*Richard Mortensen, stjóri á FT Samskifti, heldur, at talið av leitingum eftir barnaporno vísir, at tað var rætt av Føroya Tele at fara upp í norðurlendska samstarvið á økinum.*

*savnsmynd*

krevur tó, at løgreglan fyrst hevur eitt politimál, ið skal kannast. Tá kann løgreglan sleppa inn á skipanina hjá okkum at kanna eftir, hvagani leitingarnar eftir barnaporno stava, sigur Richard Mortensen.

Stjórin í FT Samskifti greiðir frá, at í mun til grannalondini hjá okkum liggja Føroyar ovarlaga á listanum yvir barnapornoleitingar í mun til fólkatalið, og at hetta prógvar, at tað var rætt av Føroya Tele at taka stig til at verða við í norðurlendska samstarvinum.

– Eg vóni tó, at vit við nýggja filtrinum fáa steðgað hesi gongd, og eg bæði vóni og vænti, at talið av slíkum leitingum fer at lækka. Tað eru í hvussu so er royndirnar úr okkara grannalondum, sigur Richard Mortensen.